Árni Dam:

# Harmast avgerð landsstýrisins um russarafiskin

**Árni Dam, russiskur umboðsmaður í Føroyum, er ógvuliga harmur um, at landsstýrið nú hevur tikið øll loyvini aftur um at lata russar keypa smáan upsa í Føroyum. Hann heldur, at tað hevði verið eitt gott hugskot at latið teir smærru útróðrarbátarnir sloppið at fiskað upsa við snellu, sum síðan kundi verið seldur til Ruslands**



*– Latið útróðrarflotan sleppa at fiska upsa við snellu og selja veiðina til russar, sigur Árni Dam, sum her vitjar á básinum hjá Sosialinum á NAFF*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

NAFF
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hann vitjar á básinum hjá Sosialinum á North Atlantic Fish Fair, og øll tekin eru um, at hann hevur nógv jørn í eldinum. Telefonin ringir, og hann tosar russiskt.

Maðurin er Árni Dam, russiskur konsul í Føroyum. Hann veit alt um virksemið hjá russikum skipum í Føroyum – eisini teimum, sum seinastu tíðina hava keypt smáan upsa og hava verið við til at »trýst« prísin upp á eitt líkinda støði. Ein prís, sum áðrenn russisku skipini byrjaðu at keypa, var totalt í botni.

Skipið, sum hevur ligið á Vestmanna, er nú á veg til Íslands, har tað fer at taka ímóti og frysta fisk í Njarvíkini. Hetta skipið hevur fryst millum 900 og 1000 tons av smáum upsa, sum føroyskir trolarar hava fiskað seinastu vikurnar.

Skipini, sum hava ligið í Saltangará, liggja har enn, men nú verður eingin upsi keyptur, tí loyvini eru tikin aftur. Í komandi viku kemur eitt russiskt skip eftir fiskinum, sum tey hava inni. Tey hava umleið 150 tons inni í part.

Árni Dam sigur, at bingjur við tómum pakningi standa á bryggjuni í Saltangará, um landsstýrið kemur til, at tað kortini er skilagott at lata russar keypa ein part av tí smáa upsanum, sum kemur upp á land í Føroyum.

– Russar vilja geva 3,50 krónur fyri kilo av smáum upsa, og hetta er við høvdinum. Eg stúri fyri, at prísurin á upsa fer at fella aftur, nú skipini eru givin at keypa, sigur Árni Dam.

Hann vísir á, at nógvir seljarar hava gjørt vart við seg og harmast um avgerðina hjá landsstýrinum, nú loyvini eru tikin aftur.

### Snelluupsi

Árni Dam sigur seg hava nevnt møguleikan fyri landsstýrinum at lata útróðrarbátar fiska upsa við snellu og selja hann til russar.

– Sum eg havi skilt, er nógvur upsi at fáa sunnanfyri og útróðrarbátar, sum royna við snellu, hava fingið væl av upsa. Men veiðan er neyvan lønandi við tí prísi, sum givin hevur verið fyri hendan fiskin.

Hann heldur, at nú norðhavsróðurin hjá útróðrarbátunum sveik, hevði upsin verið eitt gott alternativ hjá hesum bátum, um teir fingu meira fyri hendan fiskin.

– Hevði landsstýrið givið loyvi til, at russiskt skip keypti hendan fiskin, kundi eitt skip ligið í Suðuroy, samstundis sum bátar – eisini aðrastaðni úr Føroyum – kundu roynt við snellu og havt støð í Suðuroy.

Árni Dam vísir á, at hetta hevði ikki gingið útyvir ráfiskatilgongdina hjá føroysku fiskavirkjunum, tí tað loysir seg ikki sum er hjá smærru útróðrarbátunum at fiska upsa við snellu.

– Samstundis, sum hetta hevði verið ein inntøkumøguleiki hjá útróðrarflotanum, hevði hetta eisini verið við til at tikið ein part av tí stóra upsastovninum, sum er við Føroyar – og, sum helst er ein orsøkin til, at minni er at fáa av toski, sigur Árni Dam, russiskur umboðsmaður í Føroyum.

# Nú fæst ekkolodd til tráðufiskiskap

**Fyritøkan, Hummingbird, sum er eitt undirfirmað hjá Furuno, hevur gjørt eitt ekkolodd, ið er ætlað stuttleikafiskimonnum, sum fiska við tráðu**



*– Ekkolodd til tráðu er spildurnýtt í Føroyum, sigur Jens Mortan Rasmussen, sum arbeiðir hjá Radiobúðini í Saltangará*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

NAFF
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú kunnu tey, sum fiska við tráðu, keypa sær eitt ekkolodd, soleiðis at síggjast kann, um nakar fiskur er, har tey standa. Somuleiðis kunnu tey síggja, hvussu botnurin er – um grynnur eru, kneysar ella hvat tað nú kann vera, sum er áhugavert at vita hjá einum stuttleikafiskimanni.

### Fekst og salt

– Hetta er spildurnýtt í Føroyum, sigur Jens Mortan Rasmussen, sum arbeiðir hjá Radiobúðini í Saltangará.

Hann vísir á, at útbúnaðurin serliga er ætlaður til tey, sum fiska á vøtnunum, men hann kann nýtast bæði í feskum vatni og søltum sjógvi.

– Sjávt ekkoloddið fyllir lítið og »flotið«, sum ger, at myndin slær út á ekkoloddinum, kann nýtast sum flot undir tráðuni.

Hann sigur, at ekkoloddið til tráðufiskimenn er gjørt til at røkka niður á 30 metra dýpi.

Jens Mortan heldur, at eitt gott hugskot hjá tráðumonnum er at hava tvær tráður við sær, tá ið farið verður á sílaveiði.

– Tá kunnu teir hava ekkoloddið undir teirri eini tráðuni og fiska við hinari. Soleiðis kunnu teir leita eftir fiski – ella øðrvísi botni, samstundis sum fiskað verður.

### Slær út…

Spurdur, hvussu væl fiskur sæst á ekkoloddinum, sigur Jens Mortan, at sjálvt um bara ein fiskur er hjá agninum, so sæst »skrivt« á ekkoloddinum.

– So, hetta er ivaleyst eitt hent tól hjá teimum sum dáma væl at fiska við tráðu, sigur Jens Mortan Rasmussen.

Eitt slíkt ekkolodd kostar einar 1.500-2.000 krónur.




*Trý ættarlið á NAFF; Jógvan Høj, dóttirin Ester og John Høj, sum eigur og í mong ár hevur staðið fyri framleiðsluni á Norðurfisk í Árnafirði. Ytst til høgru stendur maður Ester*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Trý ættarlið umboðaðu Norðfra á NAFF

**Á áhugaverda básinum hjá Norðfra, sum er fiskavirkið í Norðdepli, vóru trý ættarlið, sum sýndu fram vøruúrvalið, sum virkið hevur at bjóða**

NAFF
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Teir eru royndir í fiskavirkisvinnuni, faðir og sonur, John Høj og Jógvan Høj, sum nú eigur og rekur virkið, Norðfra í Norðdepli.

Norðfra hevði bás á North Atlantic Fish Fair, og á básinum vóru ikki færri enn trý ættarlið.

Umframt tann roynda, John Høj, sum eigur og hevur rikið Norðurfisk í Árnafirði í mong ár, var sonurin, Jógvan, sum eisini hevur drúgvar royndir í fiskaframleiðslu.

Aftrat teimum báðum var eisini dóttir Jógvan, Ester, sum situr á skrivstovuni á virkinum í Norðdepli.

Tey trý høvdu eisini onnur fólk til hjálpar á áhugaverda básinum, eitt nú var maður Ester og kona Jógvan, sum so er mamma Ester, eisini við.

Á NAFF sýndu tey fram tær vørur, sum Norðfra hevur at bjóða føroyska- og útlendska marknaðinum.

### Okkurt í umbúna

Norðurfisk í Árnafirði læt aftur herfyri, men tað er ikki vist, at virkið ikki letur uppaftur.

– Vit eiga virkið, og virkið fer ongan veg, sigur John Høj, sum letur tað líkasum hanga í »luftini«, at okkurt er i umbúna í Árnafirði.

Í løtuni vil hann tó ikki siga, hvat hann hevur í huganum, men sum skilst, er ikki vist, at ein ætlan liggur langt burturi.



*Á básinum hjá Noðfra fingu landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum og konan heita og góða suppu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*